Havnar leksikon:

# Matvøruhandilin hjá Hans Jákup Olsen

**Hesaferð hava vit myndir av handlinum hjá Hans Jákup Olsen á Doktaragrund úti á Reyni**



*Myndin av Doktaragrund: Føroya Fornminnissavn* *Innsettu myndirnar: Gudrun Rubeksen*

Frá 1899-1955 hevði Hans Jákup Olsen matvøruhandil í húsunum »í Tranti« á Doktaragrund úti á Reyni í Havn.

Handilin sæst uttast til høgru á myndini (við pílin). Innsettu myndirnar eru av handlinum innan og av Hans Jákup Olsen (1875-1960). Hans Jákup var kendur fyri at vera væl hýrdur og í góðum lag, gekk altíð og floytaði.

Leggið til merkis gongubreytina og rennusteinin sum eru gjørd úr gróti.

Jens Olsen, sum síðst í 19. øld bygdi húsini »Handilsforeiningina« (har sum Café Natúr er í dag), byrjaði sítt viksemi í somu húsum í Tranti.

Húsini beint fram á myndini átti Carl á Lag, har búðu fólk, sum arbeiddu fisk hjá honum. Seinni vórðu tey flutt niðan á Sundsvegin, har sum einkjan eftir Carl á Lag (yngra), Inge Krause Jensen, býr í dag.

Tey, sum hava okkurt at viðmerkja í samband við hesar myndirnar, eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen, ið savnar tilfar til Havnar leksikon, á telefon 314647 / 273168.

*Næstu ferð hava myndir av minustrúkaranum »Green Dolphin« hjá Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik*

---

# Poul gjørdist kattakongur



*Teir kýta seg við tunnusláttrinum í Runavík*

*Mynd: Dinna Jensen*

Leygardagin skipaði Eysturoyar Froskmannafelag fyri tunnusláing í bátahylinum í Runavík. Ein rættiliga stórur partur av limunum í felagnum luttóku, eins og myndin vísir.

Kattakongur gjørdist Poul Joensen úr Fuglafirði.

**sb.**


Sosialurin
Sosialurin
i



Móttøka



Í samband við at P/F Kjøtbúðin, v/O. Reinert, flytir í nýggj hølir á Akranesgøtu 7, hava vit móttøku fríggjadagin 11. februar 2005 frá kl. 15.00 - 18.00

P/F KJØTBÚÐIN